# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Merkisdagar

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 24 juni verður Elin Thomsen Klaksvík (Elin hjá Skós) 80 ár. Dagurin verður hildin á Ziskagøta 10, frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin

**80 ára føðingardagur**
1. juli fyllur Kaspara Hjelm úr vági 80 ár. Føðingardagin ætlar hon at halda í Vági leygardagin 17. juli. Tey ið vilja gleða Kasparu við at koma í føðingardag verða vinaliga biðin um at siga frá innan 21. juni hjá Inu 371551 ella Torgerð 573999.

**60 ára føðingardagur**
Týsdagin 22. juni kann Poul Jóhan Djurhuus, Glyvrar, halda 60 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálabotni týskvøldið kl. 18. Byrjað verður við sangløtu, og aftaná verður borðreitt við føroyskum viðskera. Byrjað verður stundisliga. Øll eru hjartaliga vælkomin.±

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 22. juni hava Bodil og Eliesar Finnsson, Hólavegur 23, Porkeri, silvurbrúdleyp. Veitsan verður fríggjakvøldið 25. juni kl. 19 á Hotel Øravík, tey ið vilja gleða okkum at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 373860 ella 227496.

**Prógv**
Sunnudagin 20. juni fekk Ingrid Nord Olsen, Rituvík, handa prógv sum Pædagog/Diakon á Diakonháskúlanum í Århus.

**Prógv**
Jørgin Pauli Johannessen hevur 24. juni lokið próg sum Teknisk Manager Offshore á Erhvervs Akademi Sydvest í Esbjerg, við serritgerð um roykreinsiskipan umborð á M/F Norrønu.

## Rætting

Í vikuskiftisblaðnum skrivaðu vit um Hallgrím Johannesen, sum fer frá sum lærari eftir at hava starvast sum skúlalærari á Skála í 40 ár.

Har komu vit at skriva, at Hallgrím er giftur við Juliu, f. Fonsdal, úr Vestmanna.

Tað rætta er at Hallgrím var giftur við Juliu, sum andaðist í 1999.

Vit biðja orsaka mistakið.

- red




# Tórbjørn 45 ára starvsdag




Í morgin 22. juni hevur Tórbjørn Petersen í Hoyvík 45 ára starvsdag hjá P/F Mari Poulsen sum rør- og blikksmiður.

Tórbjørn er 62 ára gamal og klakvíkingur, sonur Karin, sum var av Norðoyri og Mathias Petersen, ið var av Selatrað.

Eftir lokna skúlagongd fór hann, sum teir flestu klaksvíksdreingir tá, til skips, og var tað við trolaranum Sjúrðaberg. Hann sigldi í eitt ár og fór so í land og fekk læruplass hjá Jákupi Jacobsen, ella sum klaksvíkingar siga, Jákup Blikk. Hann lærdi har í umleið eitt eitt ár og søkti so læruplass P/F Mariu Poulsen í Havn. Hann flutti til Havnar 21. juni 1965, og byrjaði at læra dagin eftir, 22. juni 1965, sum rør- og blikksmiður. Verkstaðsleiðari tá var Martin Vilhelmsen.

Í 1977 bleiv Tórbjørn settur sum verkstaðsleiðari, tá Hákun Mortensen fór í annað starv. Hákun byrjaði at læra í 1945 og var verkstaðsleiðari í mong ár. Hákun er framvegis virkin sum sjálvstøðugur rørleggjari.

Sjeytiárini høvdu stórar samfelagsbroytingar her heima, og Havnin merkti eisini til rembingarnar. Øll tey stóru virkini í býnum og úti á Eystaru bryggju fluttu út úr býnum. P/F Maria Poulsen fylgdi eisini við, og í 1982 flutti verkstaðurin og VVS handilin í nýggjan stóran virkisbygning á Hálsi. Í 1988 flutti verkstaðurin aftur, tá grannabygningurin hjá P/F Hans M. Reinert varð keyptur. Øll hesi árini var Tórbjørn verkstaðsleiðari. Hann hevur havt nógv fólk undir sær, og nógvir lærlingar vórðu útlærdir, meðan hann hevði leiðsluna.

Tórbjørn var meistari í samfull 22 ár, og hevur hann tey seinnu árini arbeitt úti. Honum dámar væl smáumvælingar, og hava nógv havnarfólk kent til hansara sera góðu hendur, og hansara góðu ráð og vegleiðingar.

Tórbjørn er giftur Annu, f. av Reyni, dóttir Finu og Sigird av Reyni. Tey eiga fýra børn, tvær gentur og tveir dreingir.

# Føroyingar hittast í Hirtshals

Síðan 1982 hava føroysk møtir verið hildin á Cosmos Trawl í Hirtshals. Í hesum sambandi skrivar Levi Joensen:

Fyri umleið 30 árum síðani kom ein stórur sildafloti dagliga til Hirtshals, fullfermdir við sild og makreli. Tann størra helvtin vóru skip úr Íslandi, men eisini vóru nógv skip úr Føroyum. Sjálvur var eg ein av teimum mongu føroyingum sum sigldi her í Hirtshals.




Eitt kvøldið vit lossaðu, stóð eg við spælið, eg stóð vælklæddur í úlpu, og veðrið var av tí ringasta. Nú síggi eg, at eitt skip leggur til kai, og menninir umborð á hesum skipi gera seg til reiðar at fara í land at hugna sær. Tá kallaði Harrin á meg og segði: Hevði onkur verið á keiini og tikið ímóti teimum, so hevði morgindagurin helst sæð betur út.

Morgunin eftir fari eg inn á Cosmos Trawl, vildi treffa stjóran. Eg fortaldi honum mín vitnisburð, fortaldi honum at eg var ein persónliga trúgvandi maður, og at eg hevði andaktir umborð á skipunum eg sigldi við. – Síðani spurdi eg hann um møguleiki var fyri at leiga matarhøllina á Cosmos Trawl til at samla føroyingar og hava møtir fyri teimum. Hann hugdi spyrjandi upp á meg og svaraði við hesum orðum: Matarhøllina fáa tit fyri einki, og eru tit tystir - setið kaffimaskinina frá. Eftir hetta fór eg glaður umborð aftur. Møtini á Cosmos Trawl byrjaðu 18. juni 1982, ein stór løta har 78 sjómenn og ferðandi samlaðust um Guds orð. Hesar løtur hava hildið áfram á hvørjum ári síðani tá, og í ár byrja tær 1. juli kl.19.30. Tó hava vit haft nøkur møtir í landi, tá vit hava verið inni í Hirthals, har ímillum hjá Mette og Kára Holm.

Møtini, sum verða hildin á nótaverkstaðinum í Cosmos Trawl, Østhavnen, Hirthals, verða hesi fimm hóskvøldini í juli og august: 1.juli, 15. juli, 29. juli, 5. august og 12.august. øll kvøldini kl. 19.30 skrivar Levi Joensen úr Hirtshals.